# Teldunýtsla hjá børnum og ungum – innan og uttan skúlans gátt



**KT-varðaútbúgvingin 2003/04**
**Verkætlanin**
**Ingolvur Gunnarson og Edvard Nielsen**

PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

## Innihaldsyvirlit:


| | |
|---|---|
| **1. Inngangur** | **s. 2** |
| **2. Fyrireiking av skúlavitjanum** | **s. 2** |
| **3. Spurnarblaðið** | **s. 2** |
| **4. Vitjaðir skúlar, flokkar og næmingar** | **s. 7** |
| **5. Viðgerð av spurnarblaðnum** | **s. 8** |
| **5.1 Hvør hevur teldur og hvussu nógvar** | **s. 8** |
| **5.2 Nær brúka næmingarnir teldu heima** | **s. 9** |
| **5.3 Hvat brúka næmingarnir telduna heima til** | **s. 10** |
| **5.4. Brúk av teldu til heimaarbeiðið** | **s. 13** |
| **6. Brúk av alnótini heima** | **s. 13** |
| **7. Chat og chatvanar hjá næmingunum** | **s. 14** |
| **8. Hvat hava næmingarnir av tólum í egnum kamari** | **s. 16** |
| **9. FirstClass** | **s. 17** |
| **10.** | |




PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

# 1. Inngangur

Teldan er vorðin ein meira og meira intigreraður partur í gerandisdegnum hjá okkum øllum, ikki minst hjá teimum ungu og børnunum, har teldan er eitt ”must” bæði innan og uttan skúlans gátt.

Í nútíðar samfelagnum er tað næstan eitt krav, at vit kenna til og duga at brúka teldu og aðrar elektroniskar samskiftismiðlar. Tað, sum fyri bara nøkrum fáum árum síðan var óhugsandi og veruleikafjart, er í dag ein heilt nátturligur partur av daglig degnum hjá okkum. Børnini og tey ungu hava á ein ella annan hátt tikið tað nýggja til sín, og man stórsti parturin av teimum hava atgongd til og nýta teldu og aðrar samskiftismiðlar hvar tey enn eru stødd. Teldan er, stórt sæð komin inn hvørt heim og hvønn skúla og verður hon nýtt sum partur av undirvísingini.

Endamálið við hesi verkætlan er at kannað og kortleggja brúk, atferð og vanar viðvíkjandi teldu hjá børnum og ungum, heima og í skúlanum. Vit hildu, at tað hevði verið áhugavert at funnið útav, hvussu børn og ung hava tikið telduna til sín, og í hvussu stórum vavið teldan verður nýtt til spæl, undirhald, sum partur av undirvísingini, teldupost, chat og alnót.

Fyri at náa endamálinum varð avgjørt, at gera eina spurnarkanning millum ung og børn á á skúlum kring landið, eisini valdu vit at vitja tvey ymisk flokstrin. Við hesum fáa vit dimensjónirnar

- geografiskt
- við kynsbýti
- við aldursbýti

# 2. Fyrireikinging av skúlavitjanum

Vit valdu aldursbólkarnar 5. flokk og 9. flokk til at svara spurnarbløðunum

- 5. flokk valdu vit, tí vit mettu, at tey samstundis sum tey enn eru børn, nøkunlunda eru før fyri at lesa, skilja og svara einum spurnarblaði.
- 9. flokk valdu vit, tí at tey eru so mikið tilkomin, at tey í størri mun hava gjørt sær sjálvstøguðar meiningar um teldur, - teldum og teldubrúki sum part av undirvíngar-/skúlamentanini og samfelagsmentanini sum heild.

Spurnarkanningin er býtt upp í tveir partar

- teldunýtsla heima
- teldunýtsla í skúlanum

Sum áður nevnt, gjørdu vit av, at vit skuldu fara út á skúlar við spurnarblaðnum, eisini valdu vit at vera fysiskt til staðar í hvørjum flokki har bløðini vórðu svaraði, hetta tí, vit sjálvir vildu greiða næmingunum frá spurnarblaðnum, og vera til staðar um spurningar stungu seg upp, fyri at minst møguligar misskiljingar skuldu koma fyri, - serliga mettu vit hetta hava stóran týdning í 5. flokkunum.

Ætlanin hjá okkum var at vitja skúlar í øllum landinum, men grunda á, at hesin framferðarháttur er sera tíðarkrevjandi í mun til fríggjadagin ið var hjá okkum at ráða yvir, eins og 9. flokkar vóru í praktikk hesa tíðina, førdi hetta við sær at vit ikki náddu hesum málið og vóru tí noyddir at velja og velja frá. Tí valdu vit at síggja burtur frá skúlunum sunnanfjørðs.

Vit settu okkum í samband við leiðslur á útvaldum skúlum, um møguleiki var fyri at vitja teir, síðan varð tíð ásett. Næmingarnir í hvørjum einstøkum flokki fingu at vita hvønn dag og tíma vit møttu, soleiðis at teir kunnu vera fyrireikaðir til hetta.

# 3. Spurnarblaðið

Spurnarblaðið er eins til báðar bólkar (5. og 9. flokk), hetta kann sjálvandi vera bæði ein styrki og ein veikleiki, men hetta valdu vit, fyri beinleiðis at kunna samanbera svørini. Næmingarnir skulu stórt sæð bara seta krossar úr fyri hvørjum spurningi, tó so, til nakrar spurningar hava tey møguleika at gera viðmerkingar

Ovast á spurnarblaðnum skulu tey skriva, hvørjum skúla og hvørjum flokki tey ganga í, og um tey eru drongur ella genta. Spurningarnir frá nr. 3 til og við 23 eru viðvíkjandi teldubrúkinum heima, og frá nr. 24. til 33 um nýtsluna í skúlanum. Sjálvt spurnarblaðið sær soleiðis út:



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

# Spurnarkanning
## Teldunýtsla hjá skúlanæmingum 2004

**1.** **Skúli:** ____________________ **Flokkur:** ____________________

**2.** **Drongur:** ☐ **Genta:** ☐

## Teldunýtsla heima (spurningar.3-16)

| | | | |
|---|---|---|---|
| **3.** | **Hava tit teldu heima ?** | ☐ | Ja, fleiri **Tal:** ☐ |
| | | ☐ | Ja, eina |
| | | ☐ | Nei |
| **4.** | **Um tit ikki hava teldu, hevur tú tó møguleika at sleppa framat eini teldu ?** | ☐ | Ja |
| | | ☐ | Nei |
| **5.** | **Hvør eigur telduna tú brúkar ?** | ☐ | Eg sjálv/ur |
| | | ☐ | Foreldur míni / húski |
| | | ☐ | Onnur (familia/vinfólk) |
| **6.** | **Hvussu nógv sleppur tú at brúka telduna ?** | ☐ | So nógv sum eg vil |
| | | ☐ | So nógv sum foreldur míni loyva |
| | | ☐ | Tá ið onnur ikki brúka hana |
| | | ☐ | Við avmarking frá foreldrum |

**7.** **Hvat brúkar tú telduna til** ***(ikki Playstation/X-Box osv.) ?***

| | | |
|---|---|---|
| **Spøl:** | ☐ | Nógv |
| | ☐ | Nakað |
| | ☐ | Als ikki |
| **Tekstviðgerð:** | ☐ | Nógv |
| | ☐ | Nakað |
| | ☐ | Als ikki |
| **Rokniark:** | ☐ | Nógv |
| | ☐ | Nakað |
| | ☐ | Als ikki |
| **Ljóðforrit:** | ☐ | Nógv |
| | ☐ | Nakað |
| | ☐ | Als ikki |
| **Mynda- og tekniforrit:** | ☐ | Nógv |
| | ☐ | Nakað |
| | ☐ | Als ikki |
| **Heimasíðugerð:** | ☐ | Nógv |
| | ☐ | Nakað |
| | ☐ | Als ikki |
| **Onnur forrit:** | ☐ | Nógv |
| | ☐ | Nakað |
| | ☐ | Als ikki |



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

| | | |
|---|---|---|
| **8. Hvussu nógv brúkar tú internetið heima ?** | | Ja, stórt sæð hvønn dag |
| | | Ja, umleið 2 - 3 ferðir um vikuna |
| | | Eina ferð um vikuna ella minni |
| | | Als ikki |

***Um tú ikki brúkar internetið heima, far so víðari til spurning nr. 15***

| | | |
|---|---|---|
| **9. Hvat brúkar tú internetið til ?** | | Til lektiuhjálp |
| | | Skaffa mær upplýsingar við |
| | | Teldupost |
| | | Downloada tónleik/filmir/spøl v.m. |
| | | Chatta við |
| | | Surfa |
| | | Annað - hvat? |

| | | |
|---|---|---|
| **10. Brúkar tú FirstClass?** | | Ja |
| | | Nei |

| | | |
|---|---|---|
| **11. Um ja, hvat brúkar tú FirstClass til ?** | | Teldupost |
| *(møguleiki at seta fleiri krossar)* | | Chat |
| | | Kalendara |
| | | Annað - hvat ? |

| | | |
|---|---|---|
| **12. Hvussu dámar tær FirstClass skipanina ?** | | Væl |
| | | Toluliga |
| | | Illa |

| | | |
|---|---|---|
| **13. Um tú chattar á internetinum, brúkar tú mest ?** | | FirstClass |
| *(møguleiki at seta fleiri krossar)* | | Messenger |
| | | Faroese Chat |
| | | Onnur chattrúm - hvørji ? |

| | | |
|---|---|---|
| **14. Hvat hugtekur teg við at chatta ?** | | Chatta við vinir og kenningar |
| | | Við næmingar / flokkar í øðrum sk |
| | | Ungdómur við somu áhugamálum |
| | | Fáa nýggjar vinir |
| | | Vera loyniligur |
| | | Tvætl og fjas |

| | | |
|---|---|---|
| **15. Brúkar tú telduna heima til skúlauppgávur ?** | | Ja |
| | | Nei |

***Um nei til spurning 15, nýtist tær ikki at svara spurningi 16***



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

**16. Hvussu nógv og í hvørjum lærugerinum brúkar tú telduna heima?**

| | | |
|---|---|---|
| **Í føroyskum:** | ☐ | Brúkt telduna til heimaarb. seinastu vikuna |
| | ☐ | Brúkt telduna fyri 2 - 4 vikum síðani |
| | ☐ | Longri síðani |
| **Í donskum / enskum / týskum:** | ☐ | Brúkt telduna til heimaarb. seinastu vikuna |
| | ☐ | Brúkt telduna fyri 2 - 4 vikum síðani |
| | ☐ | Longri síðani |
| **Í rokning / alisfr. / evnafr.:** | ☐ | Brúkt telduna til heimaarb. seinastu vikuna |
| | ☐ | Brúkt telduna fyri 2 - 4 vikum síðani |
| | ☐ | Longri síðani |
| **Landal./ náttúru og tøkni lívfr./søgu:** | ☐ | Brúkt telduna til heimaarb. seinastu vikuna |
| | ☐ | Brúkt telduna fyri 2 - 4 vikum síðani |
| | ☐ | Longri síðani |
| **Øðrum lærugreinum:** | ☐ | Brúkt telduna til heimaarb. seinastu vikuna |
| | ☐ | Brúkt telduna fyri 2 - 4 vikum síðani |
| | ☐ | Longri síðani |

**17. Um tú spælir spøl (telda / PS / X-box), spælir tú tá oftast ?**

- ☐ Einsamøll /einsamallur
- ☐ Saman við vinum

**18. Um tú spælir saman við vinfólki/øðrum, hvørji spøl spæla tit ?** ______________________

______________________

______________________

______________________

**19. Hvat eigur / hevur tú inni á tínum egna kamari ?**

- ☐ Teldu
- ☐ X-box / Playstation
- ☐ Sjónvarp
- ☐ Video
- ☐ DVD-spælara
- ☐ Stereo-anlegg

**20. Hevur tú tína egnu fartelefon ?**

- ☐ Ja
- ☐ Nei

**21. Hvat merki er fartelefonin ?** ______________________

**22. Hvat brúkar tú fartelefonina mest til ?**

- ☐ Samtalur
- ☐ Sms
- ☐ Spøl
- ☐ Annað, hvat?

**23. Hevur tú tína egnu heimasíðu ?**

- ☐ Ja
- ☐ Nei



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

## Teldunýtsla í skúlanum

| | | |
|---|---|---|
| **24.** | **Heldur tú at tað eru nóg nógvar teldur á skúlanum ?** | ☐ Ja<br>☐ Nei<br>**Viðmerkingar:** ______ |
| **25.** | **Eru teldurnar á skúlanum:** | ☐ Góðar / skjótar<br>☐ Kunnu brúkast<br>☐ Vánaligar /seinar<br>☐ Óbrúkiligar |
| **26.** | **Er internetsambandið á skúlanum:** | ☐ Gott<br>☐ Kann brúkast<br>☐ Vánaligt<br>**Viðmerkingar:** ______ |
| **27.** | **Hvussu nógv brúkar tú teldu í skúlanum ?** | ☐ Hvønn skúladag<br>☐ 3 - 4 ferðir um vikuna<br>☐ 1 - 2 ferðir um vikuna<br>☐ Av og á<br>☐ Ongantíð |
| **28.** | **Er telduundirvísing lærugrein í tykkara flokki ?** | ☐ Ja ☐ tímar um vikuna<br>☐ Nei |
| **29.** | **Um ja til spurning 28, lærur tú nógv hesar tímar ?** | ☐ Ja<br>☐ Nei<br>**Viðmerkingar:** ______ |
| **30.** | **Í hvørjum lærugreinum brúka tit teldu ?** | ☐ Føroyskum<br>☐ Donskum / enskum / týskum<br>☐ Rokning / alisfr. / evnafr.<br>☐ Landalæru / søgu / nátt.og tøkni / lívfr./<br>☐ Øðrum lærugreinum |
| **31.** | **Heldur tú lærararnir duga væl í teld / telduundirvísing ?** | ☐ Ja<br>☐ Nakrir duga væl<br>☐ Ov fáir duga væl<br>☐ Vánaligir<br>**Viðmerkingar:** ______ |



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

| | | |
|---|---|---|
| **32.** | **Brúka tit teldurnar í skúlanum nógv til spøl ?** | ☐ Ja<br>☐ Nei |

**33.** **Nær heldur tú, at telduviðuskiftini eru perfekt á tínum skúla ?** ____________

______________________________________

______________________________________

______________________________________

______________________________________

______________________________________

______________________________________

## 4. Vitjaðir skúlar, flokkar og næmingar

Skúlarnir og floksstigini vit valdu at vitja við spurnarblaðnum, síggja vit í talvuni niðanfyri:

| Skúlar | tal av 5. flokkum | tal av 9. flokkum |
|---|---|---|
| Eysturskúlin | | 1 |
| Hoyvíkar skúli | 2 | |
| Sankta Frans skúli | 2 | |
| Kommunuskúlin | 2 | 5 |
| Argja skúli | 2 | 1 |
| Skúlin á Ziskatrøð | 2 | 4 |
| Skúlin við Ósánna | 1 | 1 |
| Fuglafjarðar skúli | 1 | 3 |
| Oyndarfjarðar skúli | 1 | |
| Miðvágs/Sandavágs skúli | 2 | 2 |
| Flokkar íalt | 15 | 17 |

**Talva1**

Um vit býta talið av spurdum næmingum eftir kyni og flokkum, sær tað soleiðis út. (talva 2)

| Flokkur/Kyn | Drongur | Genta | Íalt |
|---|---|---|---|
| **5. flokkur** | **117** | **137** | **254** |
| **9.flokkur** | **136** | **129** | **265** |
| **Íalt** | **253** | **266** | **519** |

**Talva 2**

Sum sæst í omanfyristandandi talvu, so er umboðanin millum kynini og flokkarnar rættuliga eins.

Sambært heimasíðuna hjá Hagstovu Føroya, er samlaðað næmingatalið fyri allar Føroyar á hesum floksstigum:

- í 5. flokki 793 næmingar
- í 9. flokki 798 næmingar

Hetta merkir, at vit hava spurt 32% av øllum næmingunum í 5. flokki og 33% av øllum næmingunum í 9. flokki í Føroyum. Tá ið talið av teimum spurdu er so stórt, er kanningin, eftir okkara metan, væl umboðandi teldubrúk og telduvanar næminganna.

Fara víðari frá talvu 2 til talvu 3, síggja vit hvussu nógvir næmingar koma úr hvørjum skúla, á hvørjum floksstigi teir eru og hvat kyn teir eru.



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

**Spurdir næmingar í mun til skúlar, flokkar og kyn:**

| Flokkur | Skúli | Drongur | Genta | Íalt |
|---|---|---|---|---|
| 5. flokkur | Argja skúli | 14 | 15 | 29 |
| | Fuglafj. skúli | 11 | 13 | 24 |
| | Hoyvíkar skúli | 22 | 18 | 40 |
| | Kommunuskúlin | 14 | 24 | 38 |
| | Miðv. / Sandav. Skúli | 17 | 16 | 33 |
| | Skúlin við Ósánna | 7 | 9 | 16 |
| | Oyndarfj. skúli | 0 | 3 | 3 |
| | Sankta Frans skúli | 18 | 27 | 45 |
| | Skúlin á Ziskatrøð | 14 | 12 | 26 |
| 5. flokkur íalt | | 117 | 137 | 254 |
| 9. flokkur | Argja skúli | 17 | 6 | 23 |
| | Eysturskúlin | 7 | 10 | 17 |
| | Fuglafj. skúli | 26 | 22 | 48 |
| | Kommunuskúlin | 42 | 37 | 79 |
| | Miðv. / Sandav. Skúli | 7 | 11 | 18 |
| | Skúlin við Ósánna | 13 | 12 | 25 |
| | Skúlin á Ziskatrøð | 24 | 31 | 55 |
| 9. flokkur íalt | | 136 | 129 | 265 |
| Íalt | | 253 | 266 | 519 |

**Talva 3**

# 5. Viðgerð av spurnarblaðnum

Tá ið vit høvdu verið á skúlunum vit høvdu sett okkum fyri at vitja, og fingið spurnarbløðini svaraði aftur, var fari undir at viðgera dáta. Trupuleikin vit fingu, var hvussu vit á skilabesta hátt kundu handfara hetta rúgvusmikla tilfar. Vit avgjørd at at viðgera tilfarið á rokniarkinum Excel, av tí vit kendu nakað til hetta forrit.

Í hesum forriti settu vit fyrst allar spurningarnar inn í x-ásan og hvørt spurnarblaðið í y-ásan. Svarmøguleikarnar settu vit inn við talkodum, sum via eitt sokallað LOPSLAG kann formatera kodirnar til tekst, frá hesum kunna/kundu vit so via pivottabellir gera allar hugsandi tal- og ritmyndir uppá sera stutta tíð.

Av tí at kombinatiónsmøguleikarnir til tal- og ritmyndir eru óendaliga nógvar, vóru vit noyddir av velja nakrar av hesum burturúr, fyri at lýsa hvussu næmingarnir hava svara teimum ymsiku spurningunum í mun kyn, aldur og skúla.

## 5.1 Hvør hevur teldur og hvussu nógvar

| Hava tit teldu heima | | | |
|---|---|---|---|
| | Drongur | Genta | Íalt |
| Nei | 7 | 10 | 17 |
| 1 teldu | 97 | 117 | 214 |
| 2 teldur | 77 | 80 | 157 |
| 3 teldur | 40 | 41 | 81 |
| 4 teldur | 21 | 10 | 31 |
| 5 teldur | 7 | 5 | 12 |
| 6 teldur | 1 | 2 | 3 |
| 7 teldur | 2 | 0 | 2 |
| 9 teldur | 1 | 1 | 2 |
| Íalt | 253 | 266 | 519 |

**Talva 4**

Stórt sæð allir næmingarnir, ella 502 av teimum 519 ið spurdir vóru hava teldu/teldir heima, tað vil siga 96,7%. Teir ið ikki hava teldu heima hava teir flestu tó møguleika at sleppa framat eina teldu aðrastaðni.



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

Teir 17 næmingarnir ið ikki hava teldu heima (sí tavlu 4), hava teir flestur tó møguleika at sleppa framat teldu aðrastaðni, t.d. hjá familju ella vinfólki (sí talvu 5)

| | Drongur | Genta | Íalt |
|---|---|---|---|
| Ja | 6 | 8 | 14 |
| Nei | 1 | 2 | 3 |
| | 7 | 10 | 17 |

**Talva 5**

Av teimum 502 næmingunum ið hava teldu heima, eiga 167 næmingar sjálvir teldu, ímeðan talið hjá teimum ið siga telduna hoyra til húskið er 335.

## 5.2 Nær brúka næmingarnir teldu heima

Viðvíkjandi spurninginum um hvussu nógv næmingarnir sleppa at brúka telduna heima, vísir kanningin:

Talva 6 vísir tal av næmingum, í talvu 7 er hetta uppgjørt í %.

| Hvussu nógv sleppur tú framat teldu | Drongur | Genta | Íalt |
|---|---|---|---|
| Sleppi ikki framat teldu | 1 | 3 | 4 |
| So nógv eg vil | 161 | 137 | 298 |
| Tá ið onnur ikki brúka hana | 59 | 75 | 134 |
| Við avmarking frá foreldrum | 32 | 51 | 83 |
| Íalt | 253 | 266 | 519 |

**Talva 6**




**Talva 7**

Tað vísir seg, at talið hjá teimum næmingum ið sleppa at sita so nógv framman fyri telduskýggjanum er rættuliga høgt, tó so, og ikki óvantað, er tað dreingirnir ið hava munin , - ca. 2/3 av dreingjunum og 50% av gentunum siga seg kunna sita tað tíð teimum lystir. Hinvegin er talið størri hjá gentunum ið siga seg sita tá ið onnur ikki brúka hana eg við avmarking frá foreldum.



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

## 5.3 Hvat brúka næmingarnir telduna heima til

Tá ið næmingarnir sita við heimatelduna, hvat brúka teir so telduna til. Niðanfyri eru talvur settar inn til fylgjandi møguleikar:

- Spøl
- Tekstviðgerð
- Rokiniark
- Ljóðforrit
- Mynda- og tekniforrit
- Heimasíðugerð

### Teldubrúk - spøl




**Talva 8**

Sum væntað so var teldan mest brúkt til spøl, seliga dreingirnir í spæla nógv og serliga er tað teir eldur dreingirnir, har uml. 60% siga seg brúka telduna nógv til spøl. Yngru dreingirnir eru ikki so langt aftanfyri . 25 % av 5. flokksgentunum siga seg spæla nógv, hjá eldru gentunum er talið uml. 7%. Hinvegin, so er tað gjøgnungangandi so, at tey ið ikki siga seg spæl nógv, siga seg spæla nakað. Omanfyri 20% av eldru gentunum siga seg slett ikki spæla teldu.

### Teldubrúk - tekstviðgerð




**Talva 9**

Út frá talvu 9 kann m.a lesast, at tað í størri mun eru teir eldru næmingarnir ið brúk telduna til tekstviðgerð, samstundis sum fyri báðar aldursbólkarnar eru genturnar ið brúka telduna meira.



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

## Teldubrúk - rokniark




**Talva 10**

Rokniark verður ikki nógv brúkt heima av næmingunum. Størsta ársøkin er helst, at hetta er ikki nakað ein fer í gongd við av sær sjálvum, - skal lærast í skúlanum  (seinni síggja vit, at næmingarnir siga seg ikki brúka hetta nógv í skúlanum). Størsta talið er hjá eldru dreingjunum., har beint undir 30% siga seg brúka tað nakað.

Stabbarnir fyri um 5. flokkarnir brúka rokniark, siga at har eru nakrir næmingar av báðum kynum ið siga nakað, og nakrar gentur ið siga seg brúka hetta nógv. Til hetta kann viðmerkjast, at næmingarnir á Sankta Frans skúla eiga allar næmingarnar í hava svara nógv og nakað til henda spurning  (Ingolvur hevur lært sínar næmingar at brúkt rokniark í rokning og N/T).

## Teldubrúk - ljóðforrit




**Talva 11**

Stabbarnir í talvu 11, brúk av ljóðforritum, hava eina javnari fordeiling enn tær undanfarnu, bæði viðvíkjandi brúki, kyni og flokkum, tó sæst at dreingirnir  9 flokki brúka hetta meira enn hini.



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

## Teldubrúk – mynda- og tekniforrit




**Talava 12**

kki er stórur munur hvussu nógv næmingarnir brúka mynd- og tekniforrit, fyri bæði flokstrin og kynsbýti, síggja stabbarnir næstan eins út. Uml. 60% siga seg brúk hesi forrit nakað, ímillum 30 og 40% brúka hetta als ikki og ímillum 10 og 20% brúka hesi forrit nógv.

## Teldubrúk – heimasíðusmíð




**Talva 13**

Ikki yvirraskandi fyri okkum, vísri tað seg, at næmingarnir ikkibrúka telduna nógv til heimasíðusmíð. Fyri 9. flokk er talið fyri tey ið siga seg brúka hetta nakað uml. 25% fyri dreingir og 10% fyri gentur. Talið fyri næmingar á sama flokstrini ið siga seg brúka hetta nógv uml. 10% fyri bæði kynini. Brúkið, nógv og nakað, í 5. fl. kemur serliga frá einum flokki í Kommunuskúlanum.



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

## 5.4. Brúk av teldu til heimaarbeiðið




**Talva 14**

Sum sæst á talvuni omanfyri, so er tað serliga teir eldur næmingarnir ið brúka telduna til skúla-/heimaarbeiðið. Hetta er ikki so løgið, tí teir hava jú fleiri uppgávur at avl. í skúlanum.

Hyggja vit eftir stabbunum hjá teimum yngru, so eru fleiri gentur ið brúka telduna til heimaarbeiðið. Hetta er eisini nakað vit kenna aftur frá okkara egna arbeiðið sum lærarar, - tá ið næmingar skulu lata skrivligar uppgávur, t.d. stílar, so er fleiri gentur sum hava gjørt hesar í t.d Word, imeðan fleiri dreingir lata inn eitt skrivihefti.

Vit kundu gjørt eina sundurbýting av, í hvørjum lærugreinum tey brúka teldu til heimaarbeiði og hvussu long tíð tað er síðani fyri tær ymisku lærugreinarnar, men tað lata vit liggja á hesum sinni.

## 6. Brúk av alnótini heima

Talva 14 vísir títtleikabrúk av alnótini heima. Stabbarnir vísa tali av næmingum býtt eftir kyn og flokkum og hvussu ofta tey eru á alnótini.




**Talva 115**

Her kunnu vit m.a. lesa, at ikki eru nógvir næmingar í 5. flokki ið brúka alnótina hvønn dag, ímeðan fordeilingin er javnari yvir hinar tríggjar møguleikarnar, - als ikki, minni enn 2 ferðir pr, viku, 2-4 ferðir pr. viku. Fyri eldur næmingarnar vísir tað seg, at tað ikki eru nógvir ið als ikki brúka alnótina, - størsti parturin av gentunum eru á nótini minni enn tvær ferðir. Hjá dreingjunum í 9. fl. er fordeilingin javn fordeild yvir møguleikarnar: minni enn 2 ferðir pr. viku, 2-4 ferðir um vikuna og hvønn dag.



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

# 7. Chat og chatvanar hjá næmingunum




| | Chatti ikki | Faroese Chat | FirstClass | Messenger | Onnur Chatrúm |
|---|---|---|---|---|---|
| Drongur - 5. flokkur | 74 | 4 | 33 | 2 | 4 |
| Drongur - 9. flokkur | 39 | 46 | 27 | 15 | 9 |
| Genta - 5. flokkur | 64 | 12 | 48 | 3 | 10 |
| Genta - 9. flokkur | 33 | 56 | 14 | 19 | 7 |

**Talva 16**

Tað gongur fram á talvuni omanfyri, at  tað eru gentur og dreingir í 9. flokki sum eru tey sum chatta mest og serliga chatta tey á Faroese Chat. Í 5.flokkunum chatta fleiri gentur enn dreingir og tá ið tey chatta brúka tey fyri tað mesta FirstClass.

Tá ið næmingum dáma at sita og chatta, hvat er tað ið dregur við heum hátti at samskifta á? Tað royna vit at lýsa við talvunum niðanfyri. Til hesar talvur má viðmerkjast, at allir næmingar eru tiknir við, - bæði teir ið siga seg ikki chatta og teímum sum dáma hetta, eisni hava næmingarnir havt møguleika at seta fleiri krossar fyri hvar áhugin við chat er, tað merkir, at fleiri næmingar ganga aftur í tveimum ella fleiri talvum!




**Talva 17**



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com




Talva 18




Talva 19




Talva 20



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

# 8. Hvat hava næmingarnir av tólum í egnum kamari

Sum eitt kuriosum, valdu vit fáa næmingarnar at svara uppá hvat teir høvu inni á sínum egna verilsi heima við hús. Uttan at koma nærri inn á hesi hetta, lata vit talvurnar niðanfyri tala fyri seg sjálvar! Eitt ið tó er sjónligt, er at í dreingirnir í flestu førum eru betur "útgjørdir", enn genturnar, og serliga teir eldru dreingirnir.

**Hvat hava næmingarnir í egnum kamari:**




**Talva 21**




**Talva 22**




**Talva 23**




**Talva 24**




**Talva 25**




**Talva 26**



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

## 9. FirstClass




**Talva 27**

Sum sæst á talvuni omanfyri, so brúk ikki allir skúlar FirstClass skipanina eins nógv. Bert í 2 skúlum siga allir næmingarnir seg brúka skipanina (Oyndarfjarðar skúli og Sankta Frans skúli), á nøkrum skúlum er fordeilingin ½ um ½ hvør brúkar skipanina og ikki, á øðrum skúlum siga flestu næmingarnir seg als ikki brúka skipanina (vit undrast). Til seinasta bólkin kann sigast, at tá ið vit tosaðu við næmingarnar, søgdu fleiri seg ikki kenna FC, aðrir søgdu at tey kendu skipanina, men antin ongantíð høvdu fingið password, ella at tey høvdu fingið hetta fyri langari tíð síðani, men høvdu gloymt hetta og tí ikki brúktu skipanina!!

Talvurnar niðanfyri vísa %-vísa talið av næmingum í brúka postskipanina, chatskipanina og kalendaran




**Talva 28**




**Talva 29**




**Talva 30**

Talvurnar fyri postskipanina og chatskipanina endurspegla talvuni omanfyri ið vísir FC brúk á teimum ymsiku skúlunum. Seinasta talvan, - talvan yvir brúk kalendaranum, verður lítið og onki brúkt av næmingunum.



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

**Hvussu dáma so næmingunumFirstClass skipanina:**




**Talva 31**

Sum vit síggja í talvuni omanfyri,so er ymsikt hvuss næmingarnir á teimum ymisku skúlunum dáma skipanina. Vit meta hetta sigur eitt sindur um hvussu skipanin er presentera næmingunum av lærarunum á teimum ymisku skúlunum. Egnar royndir siga okkum, at kennir lærarin FC og kann vísa næmingunum á møguleikarnar hon rúmar, er víst at teir taka hana nærri at sær enn annars.



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

## Viðmerkingar frá næmingum um telduviðuskiftini á skúlum:

### 9. fl. dreingir:
- Ov fáar teldur / teldurúm í mun til talið av næmingunum
- Ein fartelda til hvønn næming
- Telduútbúnaðurin ov gamal
- Teldurnar ov seinar (out of date)
- Internetsambandið vánaligt
- Telduútbúnaðurin eiga at vera dagførdar til einhvørja tíð
- Lærararnir eiga at duga betur (endurútbúgva seg um neyðugt)
- Ongantíð – "tíðin gongur skjótari enn skúlin"
- Telurnar í skúlanum "stinka"

### 9. fl. gentur:
- Feliri tímar í grundleggjandi teldulæru
- Draga teldurnar inn sum ein natúrligan part av undirvísingini
- Lærararnir ið hava telduundirvísing eiga at duga betur
- Læarararnir eiga betur at duga at hjálpa næmingunum
- Farteldur til allar næmningarnar
- Átti at veri natúrligur partur av undirvísingini frá 1. flokki
- Næmingar eiga at ansa betur eftir hvussu teir fara við teldunum
- Talið av teldum í teldustovuni veri til heilan flokk
- Fleiri telurúm, soleiðis at um tú arbeiddi við uppgávum, so eigur tú at sleppa framat fleiri tímar í slag
- Nakrar teldur (2-4) eiga at vera í hvørjum flokshøli

### 5. fl. dreingir:
- Ov nógvir næmingar  -  ov fáar teldur
- Nakrar teldur skulu vera í hvørjari skúlastovu
- Eina farteldu til hvønn næming
- Eiga at kunna lánt eina teldu um vit høvdu brúk fyri einari (útlán eins og bøkur á bókasavninum)
- Lærararnir eiga at duga betur
- Teldurnar eru alt ov seinar
- Slepp ov sjáldan at brúka teldurnar í skúlanum, tí lærararnir vit hava duga ikki við teldum og vilja tí ikki lova okkum
- Møguleika at veri dupulttíma í teldurúminum so vit kunnu fáa tað burturúr vit eiga (ov nógvir næmingar/flokkar í mun til tali av teldum)
- Telduútbúnaðurin alt ov vánaligur
- Ov fá ordulig spøl – sloppi at spælt meira
- Ok sum er
- Ongantíð

### 5. fl. gentur:
- Nakrar teldur eiga at vera í hvørjum flokshøli
- Eina farteldu í part
- Altíð fleiri teldur sum eru í óordan
- Feliri lærarar duga ikki at hjálpa um vit hava brúk fyri tí
- Lærararnir eiga ikki at kunna lesa privat brøv hjá næmingunum
- Teldurúmini við teldum til heilan skúlaflokk
- Fleiri teldustovur, soleiðis at vit sleppa framat tá ið vit hava brúk fyri tí
- Altíð onkur telda í óordan
- OK sum er



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

## Niðurstøða.

Endamálið við hesi verkætlanini var at kanna teldudunýtsluna hjá ungum og børnum, bæði til egið brúk og brúk á skúlanum. Við stóra talinum av spurdum í mun til samlaða talið í aldursbólkinum, er grundalag fyri at fáa eina neyva lýsing av teldubrúkinum hjá ungum og børnum í Føroyum. Vit halda, at vit hava mátt okkara máli at fáa lýst teldunýtsluna og telduviðurskifti hjá ungum og børnum í Føroyum.

**Niðurstøðan er hendan:**

- Næmingar í Føroyum brúka teldu heilt nógv, serliga til spøl

.

- Næmingar í Fø brúka nógv internetið uml. 2 – 4 ferðir um vikuna. Dreingir brúka internetið nógv til at downloada tónleik/film/spæl og at skaffa sær upplýsingar við, meðan genturnar brúka internetið at surfa og at chatta við.

.

- Næmingar brúka nógv ljóðforrit og forrit til spøl, serliga er tað dreingir sum brúka telduna til spøl..
- Næmingar dáma væl at chatta, seliga gentur í 9. floklksaldrium og tað sum hugtekur tær mest við chatta við vinir og kenninga og at vera loyniligur, dreingir í 9. dáma væl at tvætla og fjasa tá teir chatta.
- Tá næmingarnir spæla telduspøl, spæla teir fyri tað mesta einsamallir. Næstan allir spurdir næmingar hava fartelefon, og veður fartelefonin brúkt til at samtala við og eisini at senda sms við. Tey allarflestu eini 90% hava eina Nokia fartelefon.
- Bert 37 næmingar av teimum 519, ið spurdir vórðu hava egna heimasíðu.
- Næmingarnir í 9. flokki, serliga dreingirnir, halda at skúlin ikki hevur nóg nógvar teldur at arbeiða við. Í 5. flokki er støðan ørvísi, stórstiparturin heldur at tað eru nóg nógvar teldur á skúlanum, tað eru serliga genturnar sum siga tað.
- Viðvíkjandi hvat teir halda um hvussu skúlans teldurnar eru, vísti kanningin , at dreingirnir, serliga teir eldru, halda at teldurnar eru vánaligar og óbrúkiligar og at tær eru alt ov seinar. Genturnar halda hinvegin at teldurnar á skúlunum kunnu brúkast, og fleiri gentur í 5. flokki halda at tær eru góðar og skjótar.
- Næmingarnir halda at internetiambandið á skúlanum er gott og skjótt og er væl brúkiligt

.

- Næmingarnar brúka teldu á skúlanum av og á, og nakrir brúka tær eina til tvær ferðir um vikuna

.

- Tað vísir seg at verða tilvildarligt í hvørjum lærugreinum næmingar nýta teldu á skúlunum, tað er helst tí, at tað er so ymiskt sum førleiki hjá lærarunum er brúka telduna sum ein part av undirvísingini.
- Viðvíkjandi hvat næm halda um at lærarnir duga í teld/telduundirvísingini, sigur ein helvt av næm at nakrir duga væl, serliga er tað næmingarnir í 5. flokkunum sum halda at lærarir duga væl við teldu.
- Dreingirnir í 9. flokkunum halda, at læraranir duga illa eru vánaligir til teld/telduundirvísing.
- Tað verður spælt nógv á skúlunum, serliga er tað 5. flokkur, sum brúkar teldurnar á skúlanum til spøl, meðan í 9. flokki siga umleið helvtin av næmingunum at teir brúka teldurnar nógv til spøl.
- Tað er lítil og eingin munur á næmingarnir hvat viðvíkjur teldunýtslu hvar út landinum teir koma frá, tó síggja vit ein tendens at næmingarnir í høvuðsstaðnum hava fleiri teldur og hava fleiri at ting á kamari sínum, og at dreingir hava meira elektronisk útgerð enn genturnar hava.



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com

Staðfestast kann burturúr kanningini at teldan er ein stórur partur av gerandisdegnum hjá børnum og ungum í Føroyum, vit meta at at tann føroyski næmingurin, er á sama støði og standa onki aftanfyri ungdómar á sama aldri í okkara grannalondum, sum eru millum tey mest framkomnu í heiminum. Til egið brúk hava føroysku næmingar mest framkomnu tøknina og tøkni til at samskifta við. Teir hava yvirhøvur fría atgongd til at nýta teldutøknina heima við hús. Vit kunnu rokna við at tá núverandi unga ættarlið er vaksið til, verður KT-tøknin ein nátturligur og sjálvsagdur partur av bæði arbeiðslívi og fríðtíðarlívi teirra.

Tá tað ræður um teldur/telduundirvísing í skúlanum kunnu vit út frá svarunum frá næmingum siga at í dagsins skúla verður teldan nýtt tilvildarliga og óskipað, tað gongur fram at ikki at á teim flestu skúlunum , um ikki øllum, at tað væntar ein skipaður teldupolitikkur á hesum øki. Næmingarnir meta at teir læra einki nýtt og sleppa alt ov sjáldan framat at arbeiða við teldurnar . Bæði kt-útbúnaður og førleiki hjá lærarum fylgja ikki við tíðini og fleiri næmingar siga í viðmerkingunum at teir meta seg duga líka um ikki betur enn flestu lærararir at nýta kt-tøknina.

At enda er at siga, at tað hevur verið spennandi og áhugavert at arbeitt við verkætlanini, vit hava lært nógv um hvussu teldanunýtsla er yvirhøvur hjá næmingum í føroyska fólkaskúlanum, eisini hava vit fingið innlit í hvussu man brúkar telduforrit til at viðgera dátu og upplýsingar, vit fara til endans at takka okkar lestrarvegleiðara Petur F. Zachariassen fyri hollan kunnleika og leiðbeining í verkætlanini.

Juni 2004

*Ingolvur Gunnarsson og Edvard Nielsen*



PDF created with FinePrint pdfFactory Pro trial version http://www.fineprint.com